**Verkstova um harðskapsøkið og samstarvið yvirum um geirar og markamót**
**hósdagin 7. desember 2023 á Panorama á Hotel Hafnia**
**Endarøðan hjá Sirið Stenberg, landsstýrisvkinnu**

Takk fyri ein góðan og gevandi dag til tykkum øll, serliga arbeiðsbólkin fyri stórt og gott arbeiði. Eg fari at samanum dagin.

Tá ið eg varð undir útbúgving til sjúkrarøktarfrøðing í 1992 og í starvslæru á Sankt Hans Sjúkrahúsinum má eg viðganga, at eg var ikki sørt bangin fyrstu ferð eg fór inn har. Hetta broyttist eftir nakrar dagar. Og eg má viðganga, at eg kenni fleiri fólk, ið eru verri fyri enn tey, sum eg møtti har.

Og hvat er tað so, sum eg vil siga við hesum*, jú at tað, sum vit ikki vita nakað um, tað síggja vit slett ikki!* Sama er galdandi fyri harðskap, sum ”ikki altíð hevur verið til”.

Eg kanna eisini taka í mítt arbeiðið seinni, bæði sum heimasjúkrasystir og sum heilsufrøðingur. Jú, eg upplivdi, at familjur vóru harðskapsraktar. Við tí vitan eg havi í dag spyrji eg meg sjálva, hvussu nógv havi eg ikki sæð? Tí sæð í ljósinum av tølini fyri harðskap, so havi eg ikki sæð alt. Verri enn so.

Hyggi eftir plakatunum:

Visti tú at:

- 4 av 10 kvinnum
- 1 av 10 monnum
- 6 av 10 børnum

Liva í harðskapi

Hetta eru stór og ógvuslig tøl, gott nokk donsk tøl.

Talan er um eina epidemi. Líka ella har áleið sum korona. Men verður tað handfarið sum so?

—

Taka vit støðuna við harðskapi móti kvinnum í eitt alheimsljós, so vísa upplýsingar frá ST, at 736 milliónir kvinnur og gentur eru fyri harðskapi, minst einaferð í lívinum. Nærum ein av hvørjum trimum.

Í heimshøpi verða 5 gentur/kvinnur dripnar hvønn tíma av onkrum í teirra nærumhvørvi

Harðskapur kann henda fyri øll, men samstundis vísir ST á, at tað eru bólkar av kvinnum, hvørs lívsumstøður gera tær serliga útsettar. Ungar gentur og eldri kvinnur er t.d. meira útsettar. Fólk, sum eru flutt í onnur lond og flóttafólk eru útsett. LGBT+ fólk. Etniskir minioritetir og fólk, sum liva í økjum har kríggj og humaniterer kreppur raka. Og fólk, sum bera brek. Hetta eiga eisini vit at hava fyri eygað.

Harðskapur er altíð eitt brot á grundleggjandi menniskjarættindi og átøk í fyribyrgja og at basa harðskapi er tí eisini altíð ein íløga í menniskju og menniskjarættindi.

86% av øllum heimsins kvinnum búgva og liva í einum landi, har harðskapur móti teimum er ólógligur. Og at bert 5% av heimsins londum hava málrættaðar ætlanir at basa harðskapi og enn færri hava fyribyrgingar ætlanir, Tað er ótrúligt! Vit vita hvussu nógv verða rakt. Sæð í ljósinum av hesum, so eru vit heilt frammarlaga. Og tó so, vit hava eisini okkara trupulleikar.

Kvinnuhúsið fekk í 2022 949 áheitanir. Tað merkir, at 2-3 kvinnur dagliga venda sær til Kvinnuhúsið um hjálp. Av hesum snúgva á leið helvtin seg um beinleiðis harðskap, har allarstørsti harðskapurin fer fram í nærsambondum. 2-3 kvinnur um dagin í friðarligu Føroyum. Tað gevur nakað at hugsa um! Tí hvussu nógv søkja sær hjálp? Hvussu nógv megna tað? Er tað ikki tiltikna ísfjallið, har bert ein lítil partur er undan yvirflatuni og restin fjald undir vatninum.

—

Tað var ein frálík byrjan av einum vælskipaðum degi at ganga túr og refektera yvir boðskapin á plakatunum. Bæði tølini, at barnakonur og kvinnur stutt eftir føðing er serliga útsettar, og at spyrja um harðskapin sáar fræið til at koma burturúr støðuni. At spyrja vísir, at vit bæði hyggja og síggja og gevur vón at koma burturúr harðskapinum. Men hvussu spyrja vit? Tað kann vera ein avbjóðing. Vit spyrja regluliga bæði um alkohol, um royking, um barnsburðatunglyndi, um sálarheilsu og um svøvn. So tað ber til at spyrja!

Síðani fóru vit yvir í markamót arbeiðið og eitt av endamálunum við degnum. Eitt markamót skulu vit eisini minnast til at seta orð á. Tað er tað sum situr í høvdinum á okkum sjálvum.

Tað sum vit hava verið saman um í dag, er at styrkja og deila vitan og at skapa relatiónir, tað kann flyta fjøll.

—

Í frálíka upplegginum hjá Svannu hoyrdu vit um Annu og Tummas, sum endaði við, at Anna bleiv sjúkrameldað. Grundgevingin var at" tað er strævið at vera lærari". Men talan var um harðskap.

Síðani greiddi Sólja frá um tagnarskyldu. Um upplýsing og fráboðanarskyldu, sum er so ómetaliga týdningarmikið. Avgerandi fyri at verja tann einstaka og skapa álit á myndugleikar. Tagnarskylda má virðast, men hon má ikki blíva ein forðing og tað var gott at tað bleiv víst á, nær fráboðanarskylda trumfar.

Harðskapur er ólógligur, bæði likamligur harðskapur og kynslig brotsverk og neyðtøka og at sláa børn. Ja sálarligur harðskapur er ikki kriminaliseraður enn, men tað arbeiðið er í gongd.

Meðan Eyðvør legði fram, mátti eg tíverri fara niðan í Tingið eina løtu. Men tað er nokk so sigandi – ella symbolskt – at hetta var orsaka av, at vit í tí løtuni fingu samtykt eina lóg um umvæling av vardum bústøðum, har endamálið við lógini bleiv broytt til eisini at fevna um umvælingar og ábøtur í sambandi við bústøðum til harðskapsrakt.

Doris var inni á tí trupla við samstarvinum. Hóast vit hava vitan, so samstarva vit ov lítið. Hon tók eisini týdningin av nýggju heildarverkætlanini upp og tað at fáa kommunurnar við í arbeiðnum. Hetta er eg sera samd í.

Doris kom eisini inn á hetta við at hava eitt stað at venda sær til. Er tað utopiskt? Ella eru vit øll ikki tað staðið? Og duga vit hvør sær at siga hvat júst okkara uppgáva er – ella vita vit bert hvat "hini" áttu at gjør? Takk fyri Doris, eisini fyri at bróta tabu og fyri tín opinleika.

—

Samstarv tekur tíð og er komplekst. Dagar sum hesin hjálpa munandi. Vit kenna tað eisini frá øðrum fak økjum, eitt nú sjúkrahúsverkinum. Men lat okkum minnast til, at samstarv er ikki eitt val - tað er bæði ein fortreyt og ein treyt. Megna vit ikki tað, so megna vit ikki at hjálpa harðskapsraktum.

—

Vit endaðu dagin við framløgum av tí arbeiði, sum verkstovubólkarnir hava framleitt. Hetta er ein øðrvísi máti at leggja fram uppá og gav hetta eitt gott innlit. Vit fingu tosa um týdningin av :

- At fáa harðskapfakligheit inn í útbúgvingarnar
- Verkætlanarleiðarin er avgerandi, takk Anna Katrin
- Kjekklistar, t.d. hvussu og hvat vit skulu spyrja um
- Tagnarskyldan má ikki blíva ein forðing
- Vit mugu arbeiða við at tryggja samtykki
- At heimasíðan hjá Sig frá er innvikla
- Hvussu tosa vit um harðskap – ella ikki?
- Skrásetingin av harðskapi, tey smáu forholdini í Føroyum, um slatur og stigmatisering
- At spyrja um kynsligan harðkap, sálarheilsu og alt møguligt, men ikki um harðskap
- Um Setrið, gransking og menning
- Vit hava nógv gott, hvussu fáa vit skuapð okkum betri?

At dagurin endar við nøkrum ítøkiligum er týdningarmikið. Dagurin er góður fyri okkum, sum eru her. Men hann skal samstundis koma teimum harðskapsraktu til góðar. Dagurin skal samanumtikið bøta um okkara dagliga arbeiðið og hann er ognaður teimum harðskapsraktu.

Samanumtikið hava vit nú nóg og gott tilfar at arbeiða víðari við. Vit kunnu við hesum góða stevi koma væl víðari fram á veg. Túsund takk skulu tit øll hava fyri tykkara íkast til verkstovu dagin í dag.

Takk fyri

Sirið Stenberg, landsstýriskvinna í almanna- og mentamálum